Nýggir filmar hesa vikuna

Støð
Filmsheiti, **Dagur/ar *(klokkutíð)***

Svf
Shanghai Noon – am. Kovboyfilmur, **05.** ***(22.45)***
Ljósareyði pantarin – am. skemtifilmur, **06.** ***(19.45)***
Anna – danskur filmur, **07.** ***(21.35)***
Trapped – amerikanskur vanlukkufilmur, **08.** ***(22.55)***
Chinatown – oscarvirðisløntur bel.krimi, **09.** ***(21.55)***

3+
Deuce Bigalow - ert tú til nakað?, **11.** ***(20:00)***
Deyðans gap, **05.** ***(21:50)***
Foreldrafellan 3, **05.** ***(20:00)***
Her gongur væl, **07.** ***(16:45)***
Jaws, **05.** ***(21:50)***
Super Dave á ekstremum ævintýrum, **08.** ***(19:00)***
Vikuskifti í Helviti, **08.** ***(20:40)***

BBC Prime
Kommissær Morris Rose, **05.** ***(21:30)***
Morris Rose kommisserur, **05.** ***(21:30)***

Canal+
Cause of Death, **11.** ***(19:00)***
Handan reyðu hurðina, **09.** ***(19:00)*** **11.** ***(13:40)***
Klemma meg máni, **10.** ***(19:00)*** **11.** ***(7:50)***
Life as a House, **05.** ***(19:00)***
Mandolinin hjá Corellis kapteyni, **06.** ***(19:00)*** **07.** ***(8:40)***

Canal+Blå
Life as a House, **10.** ***(16:30)***

Canal+Gul
Fimta elementið, **05.** ***(6:00)***
Life as a House, **08.** ***(12:30)*** **09.** ***(22:05)*** **11.** ***(9:05)***
Mandolinin hjá Corellis kapteyni, **08.** ***(10:00)*** **10.** ***(20:00)***
Vanilla Sky, **05.** ***(23:00)***

DK4
Elise, **07.** ***(19:30)***

DR 1
Columbo: Deyðin fær jackpot, **06.** ***(21:15)***
Forces of Nature, **05.** ***(20:30)***
Framtíðarinnar maður, **05.** ***(22:15)***
Framtíðarmaðurin , **05.** ***(22:15)***
Gelinde húskið, **07.** ***(11:50)***
Legendan um pianistin á havinum, **06.** ***(23:35)***
Megin hjá vónini, **09.** ***(21:00)***

DR 2
Amy og Isabelle, **11.** ***(19:40)***
Summer Holiday, **07.** ***(16:36)***
The Million Dollar Hotel, **07.** ***(19:30)***

Hallmark
Edge Of America, **07.** ***(21:00)***
Lifepod, **05.** ***(21:45)***

TCM
Sheriffurin skýtur á alt, **05.** ***(20:00)***
Sheriffurin skýtur eftir øllum, **05.** ***(20:00)***
Skrappi Luke, **07.** ***(20:00)***

TV 2 zulu
Dr. Dolittle, **11.** ***(19:30)***
Flammuhelviti, **06.** ***(0:50)***
Spøkilsins ræðsla, **10.** ***(11:20)***

TV 3
Flýggjanin úr Absolom, **08.** ***(21:25)***
Hann, hon og hann, **05.** ***(20:00)***
Hann, Hon og Honum, **05.** ***(20:00)***
Sex Games, **11.** ***(20:00)***
Við upp á at lúra, **05.** ***(22:50)***
Við uppá lump, **05.** ***(22:50)***

TV-1000
Áðrenn regnið, **08.** ***(19:00)***
Life Without Dick, **05.** ***(19:00)*** **10.** ***(21:00)***
Shriek if You Know What I Did Last Friday the 13th, **11.** ***(4:00)***
Texas Rangers, **07.** ***(19:00)***
The Contaminated Man, **09.** ***(2:30)***
The Man Who Wasn't There, **06.** ***(19:00)***
The Stickup, **10.** ***(4:10)***
Vokskabinettin, **11.** ***(19:00)***

TVDanmark1
Dudley Do-Right, **09.** ***(20:00)***
Ein vakur drepari, **07.** ***(0:25)***
Going Under, **05.** ***(20:00)***
Gulli̇ð í El Condor, **06.** ***(13:30)***
Klørnar hjá narkoliguni, **06.** ***(2:25)***
Mercy, **06.** ***(21:00)***
Ómøguliga valið, **07.** ***(20:35)***
Spøkilsishúsið, **06.** ***(23:15)***
Trojan War, **07.** ***(19:00)***
Vinningsjagstrarrarnir 2, **11.** ***(20:00)***

TVDanmark2
Cash in Hand, **05.** ***(11:20)*** **06.** ***(1:45)***
Tey komu, tey sóu, tey runnu, **06.** ***(19:05)***

Fríggjadag 5. kl. 19.00

Stjørna í eitt kvøld
Svf

Fleiri túsund gávurík sangfólk hava roynt at koma sær upp í sangkappingina "Stjørna í eitt kvøld", einans nøkur fá sleppa at kappast. Teirra millum er aftur ein føroyingur, Jens Marni Hansen. Í fyrstu sendingini hitta vit m.a. vinnaran frá í fjør, Guðrun Sólja.

Fríggjadag 5. kl. 20.00

Going Under
TV Danmark 1

Smá-nevrotiski kavbáts-kapteinurin Bitt Banner fær sum uppgávu at sigla nýggja kavbát-in USS Sub Standard sína jomfrú-ferð. Men Banner veit ikki at korrupti admiralurin Malice og vápnasmiðjurin Wedgewood hava gjørt kavbátin við eini rúgvu av feil-um og hava tikið milliónir av dollar-um í egnan lumma. Og manningin er heldur einki at reypa av.

Fríggjadag 5. kl. 20.00

Hann, hon og honum
TV3

Ungu vinirnir Brian og Jake hava verið bestu vinir so leingi teir minnast, men eina dagin verður hetta vinarlagið sett á roynd. Teir báðir forelska seg í tí somu gentuni. Hon eitur Anna Rielly og er ein barndómsvinur, sum teir báðir ikki hava sæð í fleiri ár. Tað, at Jake er ortodoksur rabbinari og Brian er katólskur prestur ger alt meiri fløktari.

Fríggjadag 5. kl. 21.50



Deyðans gap
TV3

Politiovastin Brody, ein ungur havbiologur og hávafiskarin Quint taka seg saman og ætla fanga tann deyðsvandamikla trý tonsa hvíta dreparahávin. Hesin filmurin frá 1975 er ein mest væleydnaðu ræðufilmunum í filmsøguni yvirhøvir, Steven Spielberg hevur leikstjórnað.

Leygardag 6. kl. 18.30

Fame Academy
BBC Prime

Fame Academy er aftur úti í Bretska ríkinum og leitar eftir ungum talentum. Hetta er ein serlig tónleikalig-reality kapping. Tey, ið ikki klára seg nóg væl verða vald frá, men fyri hepna vinnaran er møguleiki fyri eini stjørnutilveru.

Leygardag 6. kl. 19.00

The Man who wasn´t there
TV1000

Teir kendu Coen-brøðurnir standa aftanfyri hendan filmin. Ed Crane er ein lítillátin barberur, sum mistonkjir sína kynisku og vátligu konu fyri at hava eina afferu við sínum stjóra. Tá ein opportunistiskur fremmandur kemur til býin, gongur Ed við til eina avpressingsætlan, sum skal gera hann ríkan. Men tað gongur als ikki sum ætlað.

Leygardag 6. kl. 19.05

Three Amigos
TV Danmark 2

Í 1916 herjar El Guapo og hansara harkalið tann lítla meksikanska býin Santo Poco. Teir stjala og gera seg inná íbúgvarnar. Vakra Carmen torir at fara eftir hjálp. Stutt eftir kemur hon aftur við Lucky Day, Dusty Bottoms og Ned Nederlander - triggjar romantiskar films hetjur, ið stríðast móti órættvísi og óndskapi. Hesir hava púrasta misskilt støðuna.

Leygardag 6. kl. 19.45

Ljósareyði pantarin
Svf

Franski politiovastin Jacques Clouseau (Peter Sellers) er vísur í, at kendi diamanttjóvurin Sir Charles Willingham (David Niven) hevur sett sær fyri at stjala lokkandi gimsteinin hjá prinsessu Dala, nevndur "Ljósareyði Pantarin". Tann stóra jagstranin endar skjótt í ruðulleika.

Sunnudag 7. kl. 17.00



Ray Mear yvirlivir Sahara
BBC Prime

Ray Mears ferðast til seks av heimsins mest óvinarligu støðunum og tosar við einstaklingar, sum hava verið ígjøgnum tær mest hættisligu umstøðurnar. Ray møtir einum RAF-pilot, sum yvirlivdi 18 dagar uttan vatn í Sahara oyðimørkini.

Sunnudag 7. kl. 19.05

Kokurin hjá Jamie (4:5)
TV Danmark 2

Jamie sendir næmingarnar í starvsvenjing, har teir skulu læra at arbeiða saman við professionellum kokkum í bestu matstovunum í London. Hetta er ein ótrúligur møguleiki fyri næmingunum, men teirra úthaldni verður sett á roynd og tveir afturat velja at gevast við skeiðinum.

Sunnudag 7. kl. 18.50

Hugo og Rosa - kærleiki, trúskapur og vinalag
Svf

Systkini Rosa og Hugo búgva saman í barndómsheiminum í Gunby, nak-að uttanfyri Stokkhólm. Hugo, nær teimum 100, høggur enn brennis og ber inn vatn úr brunninum; Rosa tekur fram harmonikuna við einum stillum brosi. Tey liva eitt friðarligt lív fjart frá øllum nútímans hentleikum.

Sunnudag 7. kl. 20.35

Um veggirnir kundu tosað
TV Danmark 1

Triggjar kvinnur í tíðar-skeiðnum frá 1950´unum til 1990´unum hava tvey ting í felag: tær búgva í sama húsi og tær skulu allar triggjar taka støðu til eina óynskta barnerð. 1952: sjúkrasystirin Claire er vorðin við barn eftir eina stutta afferu. 1974: Familjan Barrows eigur nú húsið. Barbara ætlar at lesa hægri lestur, men hon er eisini við barn.

Mánadag 8. kl. 18.00



19direkte
DR1

Tann 11. september er tað tvey ár síðan yvirgangsatsóknina á USA kravdi næstan 4000 mannalív. Í fýra pørtum prátar 19direkta við nakrar av teimum danskarunum, hvørs lív veruliga vendu eftir 11. september. Mads Kornerup hevði ein gimsteinahandil í New York í grannagøtuni til World Trade Center.

Mánadag 8. kl. 19.00

U.S. Marshals
TV Danmark 2

U.S. Marshal Sam Gerard er ávegis í flogfari við fanganum Mark Sheridan, ið er dømdur fyri morð á tveir FBI-agentar. Flogfarið dettur niður, alt er kaos. Men Mark hjálpir Gerard við at bjarga, tí, ið bjargast kann og flýggjar síðan. Sam og hansara fólk fara undir leitingina eftir flóttanum. Meðan roynir Mark at prógva sína ósekleika.

Mánadag 8. kl. 22.20

The Tonight Show við Jay Leno
TV Danmark 1

Í fótsporum Steve Allen, Jack Paar og Johnny Carson fylgir Jay Leno, sum ein undirhaldandi late-night vertur. Í mei 2002 kundi hann hátíðarhalda 10 ára dagin fyri hansara prátsendingar við kendum gestum. Hesuferð eru gestirnir: Hilary Clinton senatorur og sjónleikarin Jay Mohr. Tónleikurin: Black Eyed Peas.

Mánadag 8. kl. 20.25

Idols
TV3

Tomas Villum Jensen og Uffe Holm er vertirnir, ið eru til reiðar at ugga luttakararnar, ið royna teirra sangtalent. Hetta gera luttakararnir frammanfyri tí kalda, kontanta, professionella og uttan iva rættvísa dómarapanelinum.

Týsdag 9. kl. 18.30

Will og Grace
TV Danmark 2

Grace er bangin fyri at hon ikki verður klár til ta stóru sniðgevarakappingina ið nærkast. Will leigar eina húshjálp fyri at lætta um hjá Grace. Húshjálpin, April, gevir Grace íblástur og billar sær inn at hon ikki kann arbeiða uttan April. Og Jack møtir einum á eini bar og sigir honum at hann er sakførari.

Týsdag 9. kl. 20.00

Dudley Do-Right
TV Danmark 1

Uppi kanadisku Rocky Mountains er ein fríðsæli Semi-Happy dalurin. Her verða lóg og skil varðveitt av Dudley Do-Right frá kanadisku løgregluni. Maðurin yvir Dudley inspektørurin Fenwick berir yvir við sínum eldhugaða, men ódugnaliga løgreglumanni. Og Dudley er skotin í døtrini hjá Fenwick, sum er komin úr Seattle at vitja pápa sín.

Týsdag 9. kl. 21.00

Absolutely Fabulous
BBC Prime

Virðislønt røð, sum gongur fyri seg í almenna mótaheiminum. Við spæla Jennifer Saunders, Joanna Lumley og June Whitfield. Edina royndir ein isolatións tanka, men hendan royndin fær meiri álvarsligari fylgir enn hon hevið væntað.

Týsdag 9. kl. 21.55



Chinatown
Svf

Tíðin er USA í ´30 árunum. Meðan hann arbeiðir við einum fløktum mutursmáli, forelskar privatdetektivurin J.J. Gittes seg í dárandi og gátuføtari ríkmansdóttirini, Evelyn. Tað er hon, sum fær hann í gongd við málið, sum hevur við sær, at detektivurin verður vundin inn í lygnir og svik í Los Angeles.

Mikudag 10. kl. 19.00 (15:26)

Oliver´s Twist
TV Danmark 2

Í sendingini Oliver´s Twist ger Jamie Oliver tað, sum hann elsker mest: Mat til sínar vinir. Gjøgnum hesa røðina av matsendingum møtir hann fólki úr allari verðini, sum hann bjóðar inn til at royna sín mat, sum tey ongantíð fara at gloyma.

Mikudag 10. kl. 19.00

Omfavn mig måne
Canal+

Nýgifti Osman býr í Danmark. Hansara aldrandi pápi Ali er á vitjan og vil hava sonin heim við til Turkaland at hjálp til við at byggja hús. Osman drálar og tað vísir seg at vera ein við gjógv ímillum faðir og son.

Mikudag 10. kl. 20.00

Road Trip
TV Danmark 1

Josh og daman, Tiffany, eru endaði á ymiskum universitetum, sostatt verður trúfestið sett á roynd. Josh hevur ongan freistaður av tí vøkru Beth og innilig løta hjá teimum báðum verður tikin uppá video, sum síðan av misgávum verður send sum heilsan til Tiffany. So byrjar túrurin frá Ithaca til Austin í Texas - Josh hevur bara triggjar dagar.

Mikudag 10. kl. 20.00



Myndlist í Føroyum 10:11
Svf

Hóast tey flestu føroysku listafólkini arbeiða við einum abstraktum myndamáli, so benda formar og rørslur í málningunum og myndum annars javnan aftur á náttúruna.

Hósdag 11. kl. 18.00

Calimero
Svf

Calimero er lítil fitti fuglurin, ið prátar øll møgulig mál, tí hann verður jú vístur í størsta partinum av heiminum. Millum annað kunnu vit møta Mommy Cesira, ið ofta lesir góðanátt søgur, altíð hendir okkurt stuttligt.

Hósdag 11. kl. 19.00

Monster Garage (2:22)
TV Danmark 1

Tann kendi og orkufylti Jesse James og hansara lið átaka truplu uppgávuna, sum er at gera eina Lincoln Town Car limosin frá 1996 til ein fullkomiliga brúkiligan brandbil. Spennandi verður at síggja um hetta fer at eydnast.

Hósdag 11. kl. 21.00

To end all Wars
TV1000

Undir 2. Veraldarbardaga verður Singapore hertikið av japanskum herdeildum. Ein bólkur av sameindum hermonnum verður tikin til fanga og settir í eina fangalegu djúpt inni í frumskógini í Burma-Siam. Teir vera noyddir at byggja eina tokbana gjøgnum frumskógina. Teir royna at yvirliva hesar ómenniskjaligu umstøðurnar og at flýggja.

Hósdag 11. kl. 21.00

SAS - Are you tough enough
BBC Prime

Trý-parta røð har 29 vanligir persónar fara undir 10 daga harða venjing við sálarligum royndum í Trossachs í mið-Skotlandi. Her venja teir saman við heimseliuni regimentinum - SAS. Verurin er Dermot O´Leary.

---

leygardagur 9. kl. 14.45

Skotland-Føroyar
ÚF

Føroyar spæla í dag sín næstseinasta dyst í hesi EM-undankappingini móti Skotlandi. Higartil hava vit bert fingið eitt stig, og tað var júst móti Skotlandi á Svangaskarði í fjør heyst. Hóast landsliðið hevur spælt fleiri góðar dystir móri t.d. Týsklandi og Íslandi hevur tað ikki eydnast at fáa javnleik ella sigur. Verður tað øðrvísi á Hamden Park í Glasgow í dag? Útvarpið sendi dystin beinleiðis.

Leygardagin 9.kl. 17.00

Vitin
ÚF

Vit hoyra Kristoffur Poulsen úr Skopun, sum í eitt mans minni hevur spælt orgul í Skopunar Kirkju.
Hann veit frá nógvum at siga, millum annað, frá barnaárunum og tíðini undir krígnum, tá hann og eitt sindur um hvussu tað var at vera Føroyingur í Danmark undir krígnum.
Pápin var handilsmaður og keypti fisk, pengar var liti til av, so oftast var tað býtishandil. Tá ið útróðramennirnir hovdu avreitt, fóru teir til hús at eta, og so oman aftur í gamla búrhandilin fyri at práta. Hann minnist væl fyrsta túrin á flot undir Hestoynni, tá systurin Tovan kom við báti eftir honum. Hann var einasti sonur í húsinum í búri, og væl var ansað eftir honum.
"Guð náði okkum sum fólk, tá Guðs orð ikki longur verður boða í hesum landið".
Símin Hansen leggur sendingina til rættis.

Sunnudagur 10. kl. 13.10

Seyður og røkt
ÚF

Vitjað verður í Innara Miðhaga á Skála, har Hallgrím Johannesen fer at greiða frá, hvussu ognarhagin har er skipaður.

Mánadagin 11. kl. 19.00

Móðurmerkið
ÚF

Útvarpið fer nú undir at lesa stuttsøgur úr savninum „Tað nýggja Atlantis." Hanus Kamban hevur týtt allar søgurnar.

Ítróttur

dk4
Speedway Grand Prix úr Prag, Kekkia

DR1
Mikudagin kl. 20.50
Hondbóltur Aalborg-Slagelse, kvinnur

DR2
Fríggjadagin kl. 18.30
Frælsur ítróttur úr Bruxelles, Belgia
Sunnudagin kl. 14.45
V5-Travet

Eurosport
US-Open Tennis úr New York, USA
EM Flogbóltur úr Týsklandi
Súkkling Vuelta Espana
Roadracing av Estoril, Portugal
EM-fótbóltur
HM Kano og Kajak úr Gainsville, USA

TV2 Zulu
Týsdagin kl. 17.20
U-21 fótbóltur Danmark.Rumenia
US-Open Tennis úr New York, USA
Súkkling Vuelta Espana
NFL fótbóltur

Sportschannel
EM-fótbóltur
Golf Bell Canadian Open
Golf Omega European Masters
Golf Solheim Cup
OL-undank. flogbóltur

VARPIÐ
Eykablað í Sosialinum hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin